Ódnarveður í Oyggjunum
Tað var av ringasta veðri í Vestmannaoyggjunum í morgun. Í nátt máldi veðurstøðin á Stórhøvda oman fyri 30 metrar um sekundi og klokkan seks í morgun 41 metrar í meðal. Tá fór vindferðin í hvirlunum kom upp um 50 metrar um sekundið. Bjargingartænastan og løgreglan høvdu fingið boð um at standa tilbúgvin, og strandfaraskipið Herjólfur avlýsti siglingina í morgun, skrivar Morgunblaðið. Íslendsku veðurmenninir høvdu boðað frá nógvum vindi eystaneftir á Vestur- og Suðurlandinum og nógvum avfalli seinnapartin.



Sjáldsom vitjan
Norðurkoreanska stjórnin kunngjørdi í gjárkvøldið, at hon fer at senda ein av sínum fremstu diplomatum til USA seinni í hesum mánaðinum. Maðurin eitur Ri Gun og hevur verið við í samráðingunum, sum Norðurkorea hevur havt við grannalondini og USA um landsins kjarnorkuætlanir. Fyrr í vikuni segði norðurkoreanski leiðarin, Kim Jong-il, at Norðurkorea er sinnað at taka kjarnorkusamráðingarnar uppaftur, men at landið vil tingast við USA fyrst. Norðurkorea og USA hava ikki diplomatiskt samband, og norðurkoreanskir diplomatar eru sjáldsamir gestir í USA, skrivar AP.

# Gulllaksurin er ein sólsk

**- Hóast fiskiskapurin eftir gulllaksi kann sigast at vera burðardyggur, er neyðugt at leggja aftrat, at veiðan kortini nærkast markinum, har tað ikki longur ber til at geva veiðini góða skoðsmálið, sum hon hevur havt, sigur havlívfrøðingurin, Lise H. Ofstad**



FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein trý ára verkætlan, sum Havstovan hevur staðið fyri, vísir, at fyrsti føroyski fiskiskapurin, sum er burðardyggur, er veiðan eftir gulllaksi.

Men ansast má eftir, at veiðan ikki gerst ov stór, um vit framhaldandi skulu kunna knýta burðardyggleikan at hesi veiði.

Í grein í nýggjastu útgávuni av Sjóvarmál, sum Havstovan gevur út, hevur havlívfrøðingurin, Lise H. Ofstad, grein um hesa verkætlan, sum hevur verið fíggjað av játtanini til fiskiroyndir, Havstovuni, Tavuni, Polarhavi, Stjørnuni, Eysturbúgvanum og JFK.

Lise dylur ikki við at siga, at gulllaksaveiðan vísir seg at vera ein sólskinssøga.

- Tað, sum verður tikið úr stovninum á hvørjum ári, er minni ella á leið tað sama sum tað, ið verður lagd aftrat stovninum um árið.

Hon vísir á, at gulllaksastovnurin tískil fungerar sum ein peningaupphædd í bankanum, har upphæddin ikki minkar, tí tað eru bara renturnar, sum verða brúktar.

Soleiðis hevur tað verið í fleiri ár.

## 14 ár á baki

Beinleiðis fiskiskapurin eftir gulllaksi byrjaði í 1995, og tey fyrstu árini vórðu umleið 8.000 tons veidd um árið.

Seinastu árini er veiðan tó vaksin heilt nógv, og í 2008 vórðu 19.000 tons landað. Tvey og trý ísfiskapør hava fiskað meginpartin beinleiðis í veiði eftir gulllaksi í tíðarskeiðinum apríl til september.

Ein partur av samlaðu veiðini kemur haraftrat sum hjáveiða í svartkjaftafiskiskapi og í veiði hjá djúpvatnstrolarum eftir kongafiski og blálongu.

Lise H. Ofstad skrivar, at stovnsmetingin av gulllaksastovninum vísir, at stovnurin í miðal fyri hvørt árið økist við umleið 21.000 tonsum í vekt.

- Tískil ber til at siga, at tað, sum skipini "heystaðu" úr stovninum í 2008, sum var 19.000 tons, var nakað minni enn framleiðslan í havinum. Á henda hátt verður stovnsrøktin varðveitt.

Havlívfrøðingurin leggur dent á, at eingin veiða í føroyskum sjógvi kann vísa á eina slíka meting.

## Góðkenning vantar

Útrokningarnar við gulllaksinum taka støði í, at stovnurin undir Føroyum er ein egin stovnur.

- Men í ICES-høpi verður føroyski gulllaksastovnurin viðgjørdur sum partur av norðuratlantiska gulllaksastovninum.

Lise sigur, at orsøkin til hetta er vantandi prógv um, hvussu útbeiðslan av gulllaksi veruliga er. Slík prógv krevja eitt nú genetiskar kanningar av fiskinum.

- Hóast fiskiskapurin eftir gulllaksi kann sigast at vera burðardyggur, er tó neyðugt at leggja aftrat, at veiðan nærkast markinum, har tað ikki longur ber til at geva royndini hetta góða skoðsmál, sum hon higartil hevur kunnað fingið, sigur havlívfrøðingurin.

## Fylgja gongdini

Hon heldur tað tí vera av alstórum týdningi, at eygu framhaldandi verða hildin við fiskiskapinum og stovnsstøddini, so tryggjast kann, at stovnurin eisini tolir hetta veiðitrýst í framtíðini.

- Verður gulllaksastovnurin rætt umsitin, soleiðis at tað einans verður fiskað burtur av vektøkingini hvørt ár, fer fiskiskapurin at geva eina góða og støðuga veiði í langa tíð framyvir, sigur havlívfrøðingurin á Havstovuni, Lise H. Ofstad.

Sosialurin kann at enda skoyta uppí, at greinin hjá havlívføðinginum er skrivað fyri einum ári síðan, og síðan greinin varð skrivað, hevur gulllaksaveiðan í ár verið væl størri enn undanfarin ár.



*Beinleiðis fiskiskapurin eftir gulllaksi undir Føroyum byrjaði í 1995. Tey fyrstu árini vórðu umleið 8.000 tons veidd um árið, men í ár er veiðan helst tríggjar ferðir so stór Mynd: Rógvi K. Mouritsen*